VINNUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF TRADE AND INDUSTRY

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 25. august 2026
Mál.: 26/13261
Viðgjørt AE
Tygara skriv: 52-009/2026

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-009/2026 frá Eiriki í Jákupsstovu, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í vinnumálum, Jacob Vestergaard, um útvarp í Viðareiðistunnlinum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu langt er arbeiðið við at gera útvarpssamband í Viðareiðistunlinum komið?
2. Nær verður hetta arbeiðið liðugt?

Svar til spurning 1 og 2
Viðareiðistunnilin var liðugur í 2016, men eingin játtan hevur verið til at fáa útvarpssambandið í lag fyrr enn í ár.

Arbeiðið upp á útvarpssambandið er í gongd, og sambært tíðarætlanini verður tað avhendað 22. september 2026, og tá fer útvarpið at hoyrast í tunlinum.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður